## Óttast ófrið undan tennisdystum í Malmö

Í næstu viku møtast Svøríki og Ísrael í Davis Cup-kappingini, og tað hevur fingið svenska politiið at seta ymisk trygdartiltøk í verk, umframt at dystirnir verða spældir fyri stongdum hurðum. Spælast skal í Malmö, og longu nú hava fleiri vinstrahallir bólkar boðað frá, at teir ætla sær at mótmæla ísraelsku innrásini í Gaza í sambandi við dystirnar.



## Fimtihvør kannaður motionistur dopaður

Av øllum motionistum í Danmark, sum blivu kannaðir í fjør, var fimtihvør dopaður, vísa tøl frá Anti Doping Danmark. Og soleiðis hevur gongdin verið síðstu trý árini. Seinnu árini eru fleiri heilsumiðstøðir komnar í Danmark, og tað kann vera ein orsøk til, at talið á dopingsyndarum ikki er fallið. Anti Doping Danmark vónar, at eitt upplýsingarátak kann venda gongdini.

# Kvinnuuppgerð í Klaksvík

**Sunnudagin tekur Stjørnan ímóti Neistanum í Klaksvík, meðan VB og Tjaldur hava útidystir ímóti teimum báðum niðastu liðunum. Úrslitið kann gerast, at toppurin verður uppaftur tættari**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Frá at hava verið ein kapping hjá VB, Tjaldri og Neistanum um at sleppa í FM-finaluna í Sunset-kappingini ímóti Stjørnuni, er tað nú meira blivið ein kapping millum øll fýra liðini um bara at koma í FM-finaluna.

Sum er, eru fýra stig millum nummar eitt og fýra, men hesin munurin kann minka sunnudagin, tá fjórðsíðsta umfarið í landskappingini er á skránni. Um Neistin vinnur á Stjørnuni og bæði VB og Tjaldur vinna sínar dystir, eru bert tvey stig á muni – og framvegis seks stig eftir at spæla um.

Við allari virðing fyri liðunum, sum bjóða av, er minst líka stórur møguleiki fyri, at Stjørnan vinnur á Neistanum, og so er alt, sum tað plagar. Og so snýr kappingin seg aftur um at sleppa at spæla finalu ímóti teimum reyðklæddu úr Klaksvík.

Men at Stjørnan tykist vera eitt sindur uppsteðgað í løtuni, hevur í øllum førum givið hinum liðunum trúnna uppá, at tey kunnu avgera tingini sjálv, so tí standa kanska nakrir serstakliga spennandi og áhugaverdir dystir fyri framman í Sunset-kappingini.

### Favorittleikluti r

Tann fyrsti av hesum verður í Klaksvík sunnudagin, tá Stjørnan tekur ímóti Neistanum, sum sær út til at hava fingið ferð á. Ikki minst hava hinir báðir kappingarneytarnir, Tjaldur og VB, kent sviðan av vælkoyrandi Neistaliðnum.

Hinvegin hevur Stjørnan nýliga tapt fyri bæði VB og Tjaldri, so hóast klaksvíkskvinnur ikki kunnu vera annað enn favorittar á heimavølli, eru nakrar skøvur komnar í lakki í síðstuni, sum hava víst, at Stjørnan eisini kann missa takið og stavnhaldið.

Í øllum førum er hetta tann mest áhugaverdi av kvinnudystunum um vikuskiftið, og lítið man vera at ivast í, at bæði vágbingar og runavíkingar fara at fylgja væl við, hvussu gongst í Klaksvík, samstundis sum VB og Tjaldur sjálvandi royna at vinna sínar dystir.

Liðini eru bæði á útivølli, og hóast tað á pappírinum kundi sæð út til, at VB hevur lættara dystin, sum er ímóti Kyndli í høllini á Hálsi í Havn, meðan Tjaldur skal yvir um fjørðin at spæla ímóti StÍF á Skála, so er í báðum førum galdandi, at liðini mugu liva upp til favorittleiklutirnar og vinna, skulu tey kunna taka kjansin.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 417 | 338 | 79 | 25 |
| 2 VB | 16 | 11 | - | 0 | - | 5 | 462 | 382 | 80 | 22 |
| 3 Tjaldur | 16 | 10 | - | 2 | - | 4 | 441 | 370 | 71 | 22 |
| 4 Neistin | 16 | 9 | - | 3 | - | 4 | 424 | 385 | 39 | 21 |
| 5 StÍF | 16 | 3 | - | 0 | - | 13 | 392 | 481 | -89 | 6 |
| 6 Kyndil | 16 | 0 | - | 0 | - | 16 | 278 | 458 | -180 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 15 | 12 | - | 0 | - | 3 | 419 | 391 | 28 | 24 |
| 2 H71 | 16 | 10 | - | 0 | - | 6 | 430 | 372 | 58 | 20 |
| 3 Neistin *) | 15 | 10 | - | 0 | - | 5 | 448 | 409 | 39 | 20 |
| 4 StÍF | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 381 | 394 | -13 | 14 |
| 5 Kyndil | 16 | 4 | - | 2 | - | 10 | 384 | 432 | -48 | 10 |
| 6 KÍF | 16 | 3 | - | 0 | - | 13 | 378 | 442 | -64 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni



*Mest spennandi og áhugaverdi dysturin í Sunset-kappingini hetta umfarið er tann í Klaksvík, har Stjørnan tekur ímóti Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Dupultur spenningur í Vestmanna

**Nú alt bendir á, at dysturin millum Neistan og VÍF frá 18. januar skal spælast umaftur, er dysturin í Vestmanna sunnudagin millum somu feløg – um gjørligt – uppaftur meira spennandi enn annars.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Kæran hjá VÍF um dystin ímóti Neistanum í Havn tann 18. januar hevur nú verið ígjøgnum bæði kappingarnevndina og dómsnevndina, ið báðar góvu vestmenningum viðhald. Tí er greitt, at um Neistin ikki áðrenn mánadagin klokkan 13 kærir málið til ítróttardómstólin hjá ÍSF, skal hesin dysturin spælast umaftur áðrenn 28. mars.

Meðan bíðað verður, møtast júst somu feløg sunnudagin í Vestmanna, har úrslitið hevur líka stóran týdning fyri báðar partar. VÍF vil vinna, tí so eru í øllum førum framvegis fýra stig niður til næsta liðið, og Neistin vil vinna, so liðið ikki dettur niðurímillum, nú endaspurturin í Atlantic Airways-kappingini av álvara er í gongd.

Sum skilst, hava venjararnir hjá báðum feløgum roynt at hildið kærumálið burtur frá spælarunum, so teir ikki skulu hugsa um tað, men bara skulu konsentrera seg um hondbóltin og tað spælið, ið fer fram á sjálvum vøllinum. Tó slepst neyvan undan, at tað kunnu vera bæði spenningar og spenningur í dystinum í Vestmanna sunnudagin, sum hevur so øgiliga nógv at siga fyri bæði liðini.



*Skuggarnir frá kærumálinum kunnu gera, at tað verða bæði spenningar og spenningur í dystinum í Vestmanna sunnudagin, tá VÍF tekur ímóti Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### H71 skal hanga í

Av hinum fýra liðunum, sum eru í fremstu mansdeildini, er tað bara H71, sum er við í kappingini um at koma í FM-finaluna. Og har eru hoyvíkingar í løtuni javnir við Neistan í stigum, tá dysturin frá 18. januar altso ikki er taldur við, so hetta eru altso liðini, sum jagstra oddaliðið VÍF, sum er fýra stig framman fyri tey bæði.

H71 vant burtur úr VÍF síðsta sunnudag og skal nú á vitjan hjá Kyndli, sum í sínum lagi mátti lúta í botnuppgerðini ímóti KÍF. Men fyri tað um Kyndil tapti fyri KÍF, er ikki víst, at H71 fær líka lætt við at fáa stigini til høldar, sum ímóti VÍF. Ofta hevur tað víst seg, at teir grønu eru tungir at syfta hjá hoyvíkingum, so hesin dysturin er helst meira opin, enn hann sær út á pappírinum.

Triði dysturin er millum tvey lið, sum bæði hava havt eitt skuffandi kappingarár. StÍF kom ikki í steypafinaluna og er dottið úr kappingini um eitt FM-finalupláss, meðan KÍF ongantíð hevur verið oman fyri næstaaftasta plássið á stigatalvuni. Nú hava kollfirðingar í eina tíð verið aftastir, men liva upp á náði, tí eingin niðurflyting verður í ár. StÍF er á heimavølli greiður favorittur at vinna, hóast týdningurin av dystinum neyvan man vera tað, ið tyngir liðini mest hesa ferð.